# taskunum?



## ”Tyggigummi má altíð vera við”

**Lisa Jacobsen,**
**lesandi, 18 ár**
”Eg havi myndatól við, um okkurt áhugavert skuldi hent. Tendrarin er eisini við, um onkur vil hava eld. Eg elski tyggigummi, so tað má altíð vera við. Smyrslið er við, um eg má hampa meg, og sjálvandi Visakortið, so eg fái keypt – tað hendir tó viðhvørt, at eg fái minus”





## ”Eg fari ongan veg uttan mín Ipod”

**Astrid Reinert Mohr,**
**lesandi, 17 ár**
”Eg havi millum annað eina perluketu og smyrsl í taskuni. Eg var í perluketuni, tá ið eg fór í ball um vikuskiftið, og legði hana so í taskuna, tá ið eg fór til hús. Tyggigummi havi eg altíð uppiá mær. Tað er bara ein vani. Eg fari ongan veg uttan mín Ipod, tí mær dámar best at lurta eftir tónleiki, meðan eg gangi. Eg havi verið á festivalum í summar, og tí havi eg oyraproppar uppi á mær, so eg ikki endi við at fáa tinitus, hóast mær dámar væl tónleik”





## ”Eg havi garn, tí mær dámar so væl at binda”

**Anna Vang,**
**krambakvinna, 41 ár**
”Eg havi garn í taskuni, tí mær dámar so væl at binda. Tá eg eri til arbeiðis, bindi eg viðhvørt í steðginum, og beint nú bindi eg eina troyggju til meg sjálva. Telefonina havi eg uppi á mær, so børnini kunnu fáa fatur á mammu síni. Feittstiftin er altíð í taskuni. Tað er tíverri eisini sera týdningarmikið hjá mær at hava panodil við mær. Eg freistist ofta til at keypa bomm, so tí havi eg tyggigummi við í staðin”

